

**NISSAN PATROL 2.8 TD** 6 mánaða garanti

**Skrásetingarnr:** TN 397 **Km:** 147.000
**Árgangur:** 11.11.1998
**Útgjald:** 32.500 **Mðr. gjald:** 3.200 (3 ár)

**kr. 130.000,-**



**TOYOTA COROLLA 1.6 STC.** 6 mánaða garanti

**Skrásetingarnr:** MR 781 **Km:** 36.000
**Árgangur:** 29.05.2006
**Útgjald:** 43.750 **Mðr. gjald:** 2.856 (5 ár)

**kr. 168.000,-**



**FORD FOCUS GHIA 1.6 BENSIN** 6 mánaða garanti

**Skrásetingarnr:** VP 011 **Km:** 35.000
**Árgangur:** 30.12.2004
**Útgjald:** 37.000 **Mðr. gjald:** 2.425 (5 ár)

**kr. 148.000,-**



**COROLLA 1.4 LUNA B. D-4D** 6 mánaða garanti

**Skrásetingarnr:** SF 673 **Km:** 88.209
**Árgangur:** 19.05.2005
**Útgjald:** 42.000 **Mðr. gjald:** 2.700 (5 ár)

**kr. 148.000,-**



**TOYOTA RAV 4 2.0 VVT-I 4X4** 6 mánaða garanti

**Skrásetingarnr:** JG 132 **Km:** 55.000
**Árgangur:** 03.02.2005
**Útgjald:** 58.750 **Mðr. gjald:** 3.744 (5 ár)

**kr. 235.000,-**



**TOYOTA COROLLA 2.0 D-4D TERRA** 6 mánaða garanti

**Skrásetingarnr:** HA 241 **Km:** 62.285
**Árgangur:** 14.12.2004
**Útgjald:** 36.000 **Mðr. gjald:** 2.350 (5 ár)

**kr. 142.000,-**



**AVENSIS 2.0 D-4D SOL DIESEL S/D** 6 mánaða garanti

**Skrásetingarnr:** RV 811 **Km:** 113.500
**Árgangur:** 03.12.2003
**Útgjald:** 47.500 **Mðr. gjald:** 4.600 (3 ár)

**kr. 168.000,-**



**COROLLA 1.6 5D H/B AUT.** 6 mánaða garanti

**Skrásetingarnr:** JH 264 **Km:** 117.878
**Árgangur:** 10.06.2002
**Útgjald:** 27.000 **Mðr. gjald:** 2.701 (3 ár)

**kr. 108.000,-**



**MAZDA 6 2.0 BENSIN** 6 mánaða garanti

**Skrásetingarnr:** GF 564 **Km:** 34.500
**Árgangur:** 03.09.2004
**Útgjald:** 34.500 **Mðr. gjald:** 2.250 (5 ár)

**kr. 138.000,-**



**SUBARU LEGACY 2.0 AUT.** 6 mánaða garanti

**Skrásetingarnr:** AD 873 **Km:** 100.000
**Árgangur:** 09.03.2006
**Útgjald:** 49.500 **Mðr. gjald:** 3.172 (5 ár)

**kr. 178.000,-**

Lagalig fígging fæst til brúktu bilarnar

**6 mánaða garanti**

**Vit bjóða nú 6 mánaða garanti uppá bilar, ið kosta meira enn 85.000,-**
Garanti skipanin, ið hevur eina sjálvsábyrgd uppá kr. 500,-, fevnir um allar knappliga íkomnar feilir, i eygsæð ikki skyldast nýtslu brúkarans, rust, uttanífrákomnir skaðar ella væntandi tænastueftirlit.
Eingin gandur og eingir smáir bókstavir.
Kom og vitja okkum · landsins fremstu bilasølu.

Vegurin Langi • Hoyvík • Tel. 353040 • Fax 353041
rs@reyniservice.fo • www.reyniservice.fo

**REYNI SERVICE** P/F


# Tvær sjálvstýriskvinnur á ting



*Kristina Larsen, vinstrumegin og Rúna Sivertsen taka nú sæti á tingi og hetta er fyrstu ferð í søguni, at tvær kvinnur manna Sjálvstýrisflokkin á Løgtingi*

Hendan næsta vikan verður søgulig hjá Sjálvstýrisflokkinum

Tá ið Løgtingsfundurin verður settur fyrrapartin í morgin, verður tað ein søgulig løta hjá Sjálvstýrisflokkinum.

Tá verður tað nevniliga fyrstu ferð, síðani flokkurin var stovnaður fyri eini heilari øld síðani, í 1906, at hann verður umboðaður av tveimum kvinnum á Løgtingi.

Teir báðir føstu tingmenninir hjá flokkinum, Kárarnir báðir við ávikavist eftirnavninum, Højgaard og Rógvi, eru báðir burturstaddur. Kári P. Højgaard í Útnorðurráðið og hin í øðrum ørindum.

Teir báðir næstu á listanum, eru Kári Petersen og Sámal Petur í Grund, men teimum, berst eisini frá at møta.

Sostatt verða tað tær báðar kvinnurnar, Kristina Larsen býráðslimur úr Fuglafirði og Rúna Sivertsen úr Klaksvík, sum taka sæti á tingi fyri Sjálvstýrisflokkin. Rúna er eisini skrivari hjá Sjálvstýrisflokkinum.



# Fish Expo Faroes nær um fullsett

TÍÐINDASKRIV

Stóra fiskivinnuframsýningin, ið verður hildin í Gundadali 27. – 29. Mai, er longu nú mest sum fullsett. Úti við 350 framsýnarar úr Føroyum og grannalondum okkara fara at vísa sína frægastu vangamynd og um vitjunartøl frá undanfarnum framsýningum eru eftirfarandi, koma úti við 10-11.000 vitjandi til framsýningina.

Í ár er fiskivinnuframsýningin flutt nærri býnum, tí hildið varð, at hon lá ov lang burturi inni á Sandvíkahjalla. Á niðara vølli í Gundadali verða tvær risa telthallir settar upp og tilsamans verða 4.000 fermetrar til framsýnarar. Við vælvild frá ítróttafeløgum og Tórshavnar Kommunu hevur borið til at flyta ítróttatiltøkini í tíðarskeiðinum, har framsýningin fer fram.

Fyri vitjandi og framsýnarar, fer tað at vera lagaligari at liggja so nær býnum, tí úr Gundadali eru bert einir 5-10 min. at ganga oman á Vaglið. Í sambandi við at Tórshavnar Kommuna hátíðarheldur, at 100 ár eru síðan hon gjørdist fólkavald kommuna, verða hópin av mentanartiltøkum í býnum um hetta mundi.

Eitt er at virkir og vinnur fáa kunnað og víst fram nýggjar vørur og tænastur, eitt annað er at hitta handilssambond og læra nýggj at kenna. Tað, at Tórshavnar býur verður karmur um Fish Expo Faroes og hundraðtals fólk stevna oman í miðbýin, kann kveikja lív og skapa ein róm av vinnuligari grannastevnu í nakrar dagar.

Tað er felagið Xpro Pf., sum í tøttum samstarvið Tórshavnar Kommunu, hevur tikið stig framsýningina. Fyriskipararnir heita í hesum sambandi á øll vinnu- og handilsrekandi í býnum um at rigga seg til og taka lut, soleiðis at vit, møguliga við broyttum upplatingartíðum, matstovum og caféum, kunnu skapa eina vinsælan dám og seta hol á summarið. Eingin ávís fyritøka hevur patent uppá tiltøk kring framsýningina og tann ella tey, ið hava hug at gera okkurt til gagns fyri almenningin, skulu als ikki halda seg aftur.

Framsýnarar úr nær um øllum vinnugreinum innan fiskiídnað taka lut, tó einamest tænastufyritøkur á landi. Frá Xpro frættist, at tað er kanska júst í fjarðandi sjógvi, at tað hevur týdning at gera vart við seg og sýna fram sínar tænastur. Í hvussu er, hevur ikki staðið á at fáa unditøku til Fish Expo Faroes '09.

Á heimasíðuni www.fex.fo sæst meira at lesa um Fish Expo Faroes.